NUMO

# FØROYA FIMLEIKASAMBAND

**Ársfrásøgn fyri 2023**

**Frumrit**

# Innihaldsyvirlit

Síða


**Átekningar**

Leiðsluátekning 1

Váttan frá óheftum grannskoðara á ársroknskapin 2

Upplýsingar um felagið 5

**Ársroknskapur**

Nýttur roknskaparháttur 6

Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2023 7

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2023 8

Notur til ársfrásøgnina 9

## Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 1. januar - 31. desember 2023 hjá Føroya Fimleikasamband.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við góðan roknskaparsið og viðtøkur felagsins.

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2023, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Tórshavn, tann 4. juni 2024

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Pól Esper Hansen<br>Formaður | Heri Sigurd Lamhauge<br>Næstformaður | Rúna Olsen<br>Nevndarlimur |
| Elin Michelsen<br>Nevndarlimur | Malan Mikkelsen<br>Nevndarlimur | |

# Váttan frá óheftum grannskoðara á ársroknskapin

*Til nevndina í Føroya Fimleikasambandi*

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Føroya Fimleikasambandi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur sambært vanligum reglum um góðan roknskaparsið, umframt eftir "Kunngerð nr. 125 frá 19. September 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan."

## Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Føroya Fimleikasamband fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu. Ársroknskapurin er gjørdur sambært vanligum reglum um góðan roknskaparsið, umframt eftir "Kunngerð nr. 125 frá 19. September 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2023 samsvarandi góðan roknskaparsið.

## Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

## Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, ætlað dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

Tórshavn, tann 4. Juni 2024

NUMO
Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Heini Mortensen
Skrásettur grannskoðari

## Upplýsingar um felagið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Føroya Fimleikasamband<br>FO-100 Tórshavn<br><br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember<br>Heimstaður: Tórshavnar kommuna |
| **Nevnd** | Pól Esper Hansen, formaður<br>Heri Sigurd Lamhauge, næstformaður<br>Rúna Olsen, nevndarlimur<br>Elin Michelsen, nevndarlimur<br>Malan Mikkelsen, nevndarlimur |
| **Grannskoðan** | NUMO<br>Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f<br>Postsmoga 1165<br>FO-110 Tórshavn |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin er løgd fram samsvarandi góðan roknskaparsið og viðtøkur felagsins.

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

Ársroknskaparárið er kalendaraárið.

Ársfrásøgnin fyri 2023 er gjørd í DKK.

## Rakstrarroknskapur

### Inntøkur

Inntøka er stuðul, limainntøka og luttøkugjøld. Inntøkan er veit felagnum innan árslok. Stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur verða tiknar við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmálainnihaldinum.

### Rakstarkostnar

Útreiðslur fevna um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsrakstur felagsins.

### Fíggjarligir postar

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir eru rentuinntøkur og rentukostnaður, umframt ásannaður og óásannaður kursvinningur og kurstap viðvíkjandi skuld og handil í fremmandum gjaldoyra.

## Fíggjarstøðan

### Støðisogn

Støðigogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum av- og niðurskrivingum. Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu. Kostprísurin á eini ogn verður býttur sundur í serstakar partar, ið verða avskrivaðir hvør sær, um nýtslutíðin er ymisk fyri ymsu partarnar.

### Áogn

Áogn verður mett til amortiseraðan kostprís, ið vanliga svarar til nominelt virði. Virðið verður lækkað við niðurskriving til at standa ímóti væntaðum tapum.

### Skuld

Skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, verður tikin við til áljóðandi virði.

# Rakstrarroknskapurin 1. januar – 31. desember 2023

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **Inntøkur** | | | |
| Stuðul | | 1.203.646 | 1.315.567 |
| Onnur inntøka | | 536.682 | 283.836 |
| **Inntøkur tilsamans** | 1 | **1.740.329** | **1.599.403** |
| | | | |
| **Útreiðslur** | | | |
| Landslið og kappingar | 2 | -852.164 | -997.038 |
| Aðrar útreiðslur | 3 | -1.058.393 | -695.866 |
| **Útreiðslur tilsamans** | | **-1.910.558** | **-1.692.904** |
| | | | |
| Avskrivingar | | -72.750 | -36.375 |
| Aðrar fíggjarligar útreiðslur | | -1.000 | -987 |
| | | | |
| **Ársúrslit** | | **-243.979** | **-130.863** |

# Fíggjarstøða pr. 31. desember 2023

| **Ogn** | Nota | **2023** | **2022** |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Heimasíða | | 254.625 | 327.375 |
| **Støðisogn tilsamans** | | **254.625** | **327.375** |
| Áogn | | 0 | 8.438 |
| Tøkur peningur | 4 | 258.345 | 360.040 |
| **Ogn í umferð** | | **258.345** | **368.479** |
| **Ogn tilsamans** | | **512.970** | **695.853** |

| **Skyldur** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Eginogn** | | |
| Flutt úrslit primo | 647.592 | 778.455 |
| Ársúrslit | -243.979 | -130.863 |
| **Eginogn tilsamans** | **403.613** | **647.592** |
| Vøru og tænastuskuld | 8.438 | 0 |
| Onnur skuld | 100.919 | 48.261 |
| **Skuld tilsamans** | **109.357** | **48.261** |
| **Skyldur tilsamans** | **512.970** | **695.853** |

# Notur

**1**

| **Inntøkur** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Stuðul** | | |
| Stuðul til Úrvals ítrótt | 223.249 | 336.773 |
| Landskassastudningur frá ÍSF | 980.397 | 978.794 |
| **Stuðul tilsamans** | **1.203.646** | **1.315.567** |
| | | |
| **Onnur inntøka** | | |
| Amboð (Einstak-/Lið-/FM-kappingar) | 108.787 | 53.221 |
| Estetisk (Steypa-/FM-kapping) | 169.220 | 115.357 |
| Inntøkur, aðrar | 258.675 | 115.259 |
| **Onnur inntøka tilsamans** | **536.682** | **283.836** |
| | | |
| **Inntøkur tilsamans** | **1.740.329** | **1.599.403** |

# Notur

| 2 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Útreiðslur, Landslið og kappingar** | kr. | kr. |
| | | |
| **Úrvals ítróttur** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandi | 98.218 | |
| **Úrvals ítróttur tilsamans** | **98.218** | **385.858** |
| | | |
| **Landslið amboð** | | |
| Venjarasamsýning | 41.310 | |
| Uppihald í Føroyum | 10.251 | |
| Kostur í Føroyum | 8.475 | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | 137.232 | |
| Uppihald í útlandinum | 113.519 | |
| Kostur í útlandinum | 11.917 | |
| Búnar, OL | 53.458 | |
| Annað | 1.285 | |
| **Landslið amboð tilsamans** | **377.449** | **279.485** |
| | | |
| **Kapping amboð** | | |
| Hølisleiða | 15.665 | |
| Ferðakostnaður | 61.497 | |
| Uppihald | 8.497 | |
| Kostur | 10.018 | |
| Heiðursmerki | 850 | |
| Annað | 25.555 | |
| **Kapping amboð tilsamans** | **122.082** | **81.799** |
| | | |
| **Kappingar estetiskt tilsamans** | | |
| Dómarasamsýningar | 18.468 | |
| Hølisleiða | 70.461 | |
| Ferðakostnaður | 39.892 | |
| Upihald | 9.176 | |
| Kostur | 20.056 | |
| Heiðursmerkir | 22.757 | |
| Annað | 73.607 | |
| **Kappingar estetiskt tilsamans** | **254.416** | **249.896** |
| | | |
| **Landslið og kappingar tilsamans** | **852.164** | **997.038** |

# Notur

**3**

| **Aðrar útreiðslur** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Galla** | | |
| Høliskostnaður | 0 | 0 |
| Høli og matur | 163.860 | |
| Undirhald | 27.000 | |
| Heiðursgávur | 18.150 | |
| Fotografur | 9.375 | |
| Pynt og annað | 1.068 | |
| **Galla tilsamans** | **219.453** | **151.456** |
| | | |
| **Fimleikarfagnaður** | | |
| Fotografur | 12.250 | |
| Leiga av høli v.m. | 67.151 | |
| **Fimleikarfagnaður tilsamans** | **79.401** | **7.872** |
| | | |
| **Fyrisitingarkostnaður** | | |
| Nevndarviksemi | 8.963 | |
| Umboðan | 675 | |
| Tryggingar | 1.841 | |
| Ferðakostnaður | 2.860 | |
| KT útgerð | 18.093 | |
| KT kostnaður | 19.859 | |
| Telefon | 1.148 | |
| Bankagjøld, postgjøld o.l. | 5.854 | |
| Grannskoðan | 13.750 | |
| Annað | 13.887 | |
| **Fyrisitingarkostnaður tilsamans** | **86.930** | **83.706** |
| | | |
| **Løn til fyrisiting o.a.** | | |
| Løn til starvsfólk | 141.765 | |
| Aðrar lønir | 32.155 | |
| Nevndarsamsýning | 44.330 | |
| Dómarasamsýning | 235.500 | |
| Eftirløn | 48.471 | |
| Onnur lønartengd gjøld | 25.029 | |
| **Løn til fyrisiting o.a. tilsamans** | **527.250** | **340.040** |

# Notur

**3**
**Aðrar útreiðslur (framhald)**

| | | |
|---|---|---|
| **Skeið amboð** | | |
| Uppihald | 3.149 | |
| Annað | 3.430 | |
| **Skeið amboð tilsamans** | **6.579** | **5.204** |
| | | |
| **Skeið Estetiskt** | | |
| Samsýning til skeiðshaldara | 6.164 | |
| Ferðaútreiðslur | 24.830 | |
| Uppihald | 21.637 | |
| Hølisleiga | 1.500 | |
| Annað | 23.496 | |
| **Skeið estetiskt tilsamans** | **77.627** | **61.401** |
| | | |
| **Skeið Breiddin** | | |
| Ferðaútreiðslur | 17.151 | |
| Uppihald | 19.967 | |
| Hølisleiga | 7.792 | |
| Annað | 3.060 | |
| **Skeið breiddin tilsamans** | **47.970** | **37.943** |
| | | |
| **Fundir** | | |
| Uppihald | 9.728 | |
| Annað | 3.457 | |
| **Fundir tilsamans** | **13.184** | **8.245** |
| | | |
| **Aðrar útreiðslur tilsamans** | **1.058.393** | **695.867** |

# Notur

| 4 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Tøkur peningur** | kr. | kr. |
| Kassapeningur | 3.000 | 3.000 |
| Betri | 0 | 88.530 |
| BankNordik | 255.344 | 271.509 |
| **Tøkur peningur tilsamans** | **258.344** | **360.038** |

NUMO Sp/f
Góðkent grannskoðanarvirki

**Roknskaparváttan fyri ársfrásøgnina 2023**

Henda váttan er latin í samband við grannskoðan av ársfrásøgnini fyri Føroya Fimleikasamband fyri roknskaparárið 2023 og sum vísir eitt úrslit fyri 2023 uppá t.kr. -244 , samlaðar ognir uppá t.kr. 513 og eina eginogn uppá t.kr. 404.

Eg skal hervið eftir bestu sannføring vátta:

1. At vit eru kunnað um ábyrgdina hjá leiðsluni fyri, at ársfrásøgnin er gjørd sambært krøvini í lóggávu og at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.
2. At kapitaltilbúgving ráðsins og framtíðarútlit stiðja uppundir, at going concern treytin er rokkin.
3. At leiðslufrágreiðingin inniheldur allar neyðugar upplýsingar, herundir at meta um ársúrslitið, fíggjarligu støðuna og møgulig óvanlig ella ótrygg viðurskifti.
4. At vit eru tilvitað um ábyrgd at menna og seta í verk innanhýsis eftirlit fyri at fyribyrgja og avdúka svik.
5. At vit ikki hava kunnleika til upplýsingar um svik, svik sum hildið verður uppá ella illgruna um svik.
6. At ársfrásøgnin ikki inniheldur týðandi skeivar upplýsingar ella viðurskifti sum eru løgd burturúr.
7. At alt viðkomandi tilfar er stilla til taks hjá grannskoðaranum.
8. At ráðið hevur uppfylt allar gjørdar avtalur, ið vóru tær ikki tað – høvdu havt týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.
9. At allar ognir ið eru tiknar við í fíggjarjavnan eru til staðar, eru ogn ráðsins og eru virðissett rætt.
10. At eingin ogn er veðsett útyvir tað, sum framgongur av ársfrásøgnini.
11. At allar møguligar skyldur og eventualskyldur eru rætt lýstar í roknskapinum.
12. At tað ikki eru verserandi ella hóttandi endurgjaldskrøv, rættarmál vm ella eventualskyldur, umframt tær í ársfrásøgnini innsettu, sum á týðandi hátt vilja kunna ávirka metingina av fíggjarligu støðu ráðsins.
13. At allir feilir og manglar, sum eru løgd fyri okkum í sambandi við grannskoðan av ársfrásøgnini eru rættaðir.
14. At tað frá fíggjarstøðudegnum og fram til í dag ikki eru hend viðurskifti, sum broytir metingina av ársfrásøgnini og sum ikki eru komin til sjóndar í leiðslufrágreiðingini ella í eini notu til ársfrásøgnina.
15. At eg havi gjøgnumgingið og góðkent úrslitið av bókhalds- roknskaparhjálp til uppsetan av ársroknskapinum, herundir tilmæltu bókingarnar og aðrar broytingar, sum ávirka roknskapirnar.
16. At reglurnar í bókhaldslógini eru fylgdar.

Tórshavn, tann 04.06.2024

Pól Esper Hansen